# Allir vegir føra til Rom

Einaferð var Rom mettur sum heimsins høvuðsstaður, og framvegis føra allir vegir til býin. Rom angar av søgu, og tað er ikki trupult at skilja, hví júst italski høvuðsstaðurin hevur havt stóran týdning í søguni.

Býurin hevur alt frá stórslignum arkitekturi til hugnaligar pizza-matstovur. At ganga og mæla í Rom er næstan sum at ganga á einum savni, tí býurin hevur so nógva spennandi søgu at bjóða. Tað ber til at leita runt í býnum í dagavís og bara draga spennandi atmosferina til sín.

Rom er sjarmerandi og hugnaligur býur, og tað er ber ikki til at sleppa undan tí italska køkinum. Tú skalt royna at sleppa undan teimum stóru matstovunum, har nógv ferðafólk leita innar, og royn heldur og finn veruligu lokalu matstøðini, har italski maturin stórtrívist. Fólk í Rom eta nógv úti á matstovum, og ofta kann eitt stórt matupplivilsi goyma seg aftanfyri eina keðiliga hurð í onkrari friðarligari síðugøtu. Spyr teg fyri, og tú fært eitt upplivisi fyri lívið.






















